gult cyan magenta svart

Mjølnir–ÍF 3–0 (25-14, 25-17, 25-16)

Mjølnir aftur í oddinum

Mjølnir gjørdi sum vænta› bart, tá tær á heimavølli royndu seg móti ÍF. Eingin ivi var nakran tí› um, hvønn veg dysturin fór at koppa

FLOGBÓLTUR
kvinnur

Hóast ÍF-li›i› hevur víst framgongd í ár, so gjørdist bitin í Klaksvík ov stórur. Vælleikandi Mjølnir-li›i› vann ein tryggan sigur, og ta› var ongantí› ivi um, hvat var ta› betra li›i›. Føroyameistararnir komu lættliga ígjøgnum dystin, og vunnu 3-0.

Fyrsta setti› enda›i 25-14, og var ta› sum ikki einafer› eitt vælleikandi Mjølnir-li›, sum vísti tær bestu dygdirnar.

Vera Larsen — sum leikti libero - hev›i sera gó›ar móttøkur, og tá hetta grundleggjandi elementi› er í lagi, so er ta› eisini eitt spæl at vera hevari, um ein dugir at n‡ta hesar móttøkunar- og ta› dugir Marjun Kalsø vi› sínum drúgvu royndum.

Anna gó›ar servur

Í dystinum vísti Anna Jacobsen eisini gott spæl, og vóru ta› serliga servurnar hjá henni, sum ÍF hev›i stórar trupulleikar av, og tí var trupult hjá teimum at fáa nøkur rættulig álop í lag, men ta› sá út sum um tær bert royndu at fáa bóltin yvir um neti› aftur til Mjølnir. Men hetta hjálpti líti›, tí hinumegin stó›u Tina Jacobsen og Sonja Ravnsfjall — sum nú slær betri enn fyrr - klárar at hamra bóltin í góvi› aftur.

Í dystinum slapp Berit Nor›oy — mi›juleikari - eisini at royna seg rættuliga, og kom hon væl frá leikinum, tá hon var innskift fyri Tinu Jacobsen. Berit hevur í ár havt stø›uga framgongd.

Eins trygt og Mjølnir vann ta› fyrsta setti›, so vann Mjølnir eisini tey bæ›i næstu ávikavist 25-17 og 25-16.

Hjá ÍF var besti leikari enn einafer› Helen á Lækjuni, sum hevur drúgvar royndir á landsli›num.

Mjølnir vann tryggan sigur á ÍF, tá li›ini bæ›i hittust í Klaksvík um vikuskifti›

Randi Larsen, ÍF

– Leygardagin høvdu vit ein av okkara vánaligu døgum, og ta› vísir seg, at vit ímóti Mjølni altí› hava stórar trupuleikar, tí Mjølnir altí› hevur havt eitt gott grundspæl, og hetta manglar hjá okkum. Komandi leygardag skulu vit leika ímóti TB á Kambsdali, og seinasta dyst ímóti teimum vunnu vit 3-2 í einum sera spennandi dysti, so henda dystin leygardagin gle›a vit okkum til, tí hetta ver›ur ein dystur, sum bæ›i li›ini vilja vinna fyri einhvønn prís.

Marjun Kalsø, Mjølnir

Vit leiktu sera væl í dag, og vóru uppsettar upp á at vinna á ÍF. Eisini vil eg rósa okkara trúgvu ásko›arum, sum eisini í ár hava stu›la› okkum sera væl. Mál okkara er nú fyrst og fremst at vinna hitt finaluplássi› í steypafinaluni. Komandi vikuskifti skulu vit til Havnar at leika ímóti Fleyr, sum altí› er spennandi, tí ta› vísir seg, at øll vilja vinna á Føroya-meistarunum.

- Men vit hava onga jólagávu vi› til Havnar, sjálvt um vit eru í jólah‡ri.

Mjølnir–ÍF 3–1 (25-20, 25-19, 20-25, 25-23)

ÍF snáva›i eisini í Klaksvík

Ta› gjørdist ein sera spennandi oddadystur í KÍ-høllini, tá ÍF kom á vitjan hjá Mjølni, men ta› vór›u enn eina fer› klaksvíkingarnir, sum drógu longra strá›i›

FLOGBÓLTUR, MENN

Lagt var upp til ein spennandi oddadyst í KÍ-høllini, og hann vóru vit ikki sn‡tt fyri, og longu undir upphitingini leg›i ein merki til, at ta› var naka› serligt í luftini, og at bæ›i li›ini fóru at leggja alla orku í at vinna dystin. Og tá sá ikki út til, at jugoslavisku tvíbur›arnir, sum leiktu á hvør sínun li›i›, kendu hvønn annan.

Li›ini fóru stavn um stavn í fyrsta setti upp til stø›una umlei› 15-15, men so klára›i Mjølnir at sníkja seg framum, og hesa lei›sluna hildu teir eisini fram til endan á settinum, sum teir vunnu 25-20. Seinasta partin av settinum sá ta› út til, at ÍF-leikararnir ikki rættuliga trú›u upp á ein sigur, og tí taptu teir eisini fleiri tápulig stig.

Mjølnir betri

Anna› setti› hev›i Mjølnir alla tí›ina tamarhald á stø›uni, sjálvt um li›ini partvíst fylgdust. ÍF kom ongantí› rættuliga vi› í leikin, og gó›a verjuspæli›, sum ÍF fyrr hevur veri› kent fyri, kom ongantí› rættuliga fram. Í hesum settinum vann Mjølnir nógv mi›juálop vi› Trúgva Poulsen, - sum er sera drúgvur – og vi› unga Hjalta Josephsen, sum tekur seg meira og meira fram. Mjølnir vann setti› 25-19.

Vend í

Um ta› var Mjølnir sum undirmetti ÍF í tri›ja setti, ella ta› var ÍF, sum tók seg saman, er ringt at meta um, men eysturoyingarnir løgdu seg klárt á odda frá byrjan og komu á odda umlei› 10-2 beinan vegin. Odd Eliasen, sum var vi› fyri fyrstu fer› í ár, var komin inn á li›i› at heva í hesum settinum, og ta› vísti seg, at hann ikki hev›i gloymt allar snildirnar enn. Hetta var líkasum vi› til at bróta rútmuna hjá Mjølni, og ta› vísti seg eisini, at Kenneth Neshamar, ÍF, sum higartil ikki hevur víst ta stóru slagstyrkina frammi vi› neti›, kom meira inn í dystin og gjørdist ein størri hóttan. Og eisini Jan Áki Olsen hjálpti ÍF væl á mi›juni hetta setti›, og hetta var ein stórur styrkur.

ÍF helt lei›sluna alt setti› og vann trygt 25-20.

Borko bleyta serv

Lagt var nú upp til eitt spennandi 4. sett, og ta› gjørdist endin á settinum eisini. Mjølnir førdi ímóti endanum 23-18, men á ein ella annan hátt megna›i ÍF at kempa seg upp á 23-23, tá Mjølnir vann bóltin aftur og kom framum 24-23. ÍF hev›i tá sterkasu uppstilling frammi vi› neti› — Boban, Kenneth Neshamar og Jan Áka Olsen. Men vi› sínum stóra kunnleika til flogbólt, so velur Borko hjá Mjølni at serva eina bleyta servu yvirum neti›, og til alla ólukku fyri ÍF, so er ta› ongin sum tekur ábyrgd og tekur ímóti hesum bólti, sum fellur beinlei›is í gólvi›, uttan at nakar nertur vi› hann.

Og Mjølnir vann setti› 25-23 og harvi› dystin 3-1, til stóra frøi fyri leikararnar og ásko›ararnar. Og Mjølnir liggur framvegis á odda í kappingini.

Bogi Isaksen, Mjølnir

– Vit høvdu vænta› at vunni› dystin í dag, men spæli› koyrdi til tí›ir ikki av tí besta, men tá so ÍF ikki tekur sær fyrimun av hesum, og eisini leikar illa, so var ta› bara gott. Í tri›ja setti — setti› sum vit taptu - vóru móttøkurnar út av lagi vánaligar, og ta› var ringt at fáa spæli› at hanga saman. Og Borco hev›i kanska ikki ein av sínum bestu døgum.

– Vit rokna vi› at koma enn betri frá seinni hálvu, og ætla at taka The Double í ár, tí um vit kunnu vinna á li›unum, tá vit leika illa, so dugi eg ikki at síggja, at naka› av hinum li›unum skal kunna vinna á okkum.

Rúni Weihe, umbo›sma›ur Fram

– Vit eru keddir av, at eingin dómari frá okkum møtti í Klaksvík, og er hetta naka› sum vit taka til vi›ger›ar innanh‡sis í komandi viku. Men hetta undirstrikar enn einafer›, at dómaratrupulleikin er ein trupulleiki, sum feløgini og FBF mugu taka upp til nærri vi›ger›ar innan alt ov langa tí›.

Fleyr–Dráttur 0–3 13-25, 19-25, 22-25

Dráttur er best

Besta kvinnuli›i› í Vágoynni er nú eisini besta li›i› í landinum. Í øllum førum eru tær ovastar á stigatalvuni ertir trygga sigurin á Fleyr

FLOGBÓLTUR
KVINNUR

Fleyr hevur seinastu dystirnar rættiliga havt vind í seglunum. Spæli› hevur gingi› væl, og hepni› hevur veri› vi›, men alt ta› var ikki nokk til at vinna á Drátti í Gundadalshøllini sunnudagin.

Var› bara hugt at úrslitunum higartil í landskappingini, so skuldi Dráttur lættliga kunna vunni› á Fleyr, men seinasta vikuskifti var TB um at koppa Drátti, og tí var ávísur spenningur undan dystinum, tí li›i› hjá Fleyr var ósigra› í trimum dystum.

Dráttur væl frá byrjan

Ta› gjørdist beinanvegin greitt, at um Fleyr skuldi fáa naka› vi› sær heim í hesum dystinum, so skuldi berjast fyri hvørjum bólti. Dráttur streyk avsta› upp á 6-0, á›renn Fleyr hev›i vent sær á gólvinum. Hesin hvøkkurin fekk Fleyr at vakna, og tær komu skjótt á lagi›, og setti› gjørdist javnt, men bara upp í 12. Fyrst vann Dráttur 5 stig so stø›an gjørdist 13-17, og so vunnu tær 8 stig á ra›, og ta› var setti›. Marina Popovich vísti servur í serflokki í hesum settinum, og ta› grunda›i Dráttur sigurin á.



Fleyr kundi líti› og einki gera vi› vágagenturnar úr Drátti, sum tykist hava sett kósina beint upp eftir

Fleyr vi› aftur

Fleyr tók sær um reiggj eftir hetta, og longu í 2. setti var spæli› heilt broytt, og nú var ta› Fleyr, i› hev›i taki›. Fleyr var frammanfyri leingi, men Dráttur ota›i seg spakuliga inn á tær aftur, og tá i› komi› var› upp í 17 stó› á jøvnum. Nú kom munurin á li›unum til sjóndar, tí Fleyr megna›i ikki at halda fast. Mistøkini vóru nógv, og spæli› datt sundur. Dráttur spældi trygt vi› fjølbroyttum álopsspæli› og kundi tí eisini taka hetta setti›.

Nú vóru gó› rá› d‡r hjá Fleyr. Tær fullu ikki í fátt, tí 2. sett gekk væl burtursæ› frá endanum. Gongdin var tann sama. Fleyr var væl vi› og enntá langt frammanfyri vi›hvørt. Av tí at móttøkan ikki var so gó›, gekk nógv av álopsspælinum ígjøgnum kantarnar og serliga Andreu Kristoffersen. Hon var besti leikarin hjá Fleyr. Eisini í tri›ja setti var ta› hon, sum vann flestu stigini, og alt bendi á, at Fleyr endiliga fór at megna at venda dystinum. Tær vóru frammanfyri 18-13 og tóktust at hava fingi› Drátt í knæ. Men trupulleikin er bara, at settini eru upp í 25, og ta› var meira, enn Fleyr megna›i. Dráttur gjørdi bart og fór frá 13-18 til 20-18, og so var bara at halda fast, og ta› gekk.

Dráttur best

Li›i› hjá Drátti er sera væl fyri. Li›i› er væl samanspælt, og tí ver›a ikki so nógv mistøk gjørd. Marina Popovich hevur givi› li›num sera nógv. Hon hevur hør› smash, men henda dystin vísti hon serliga a›rar dygdir. Servurnar eydna›ust væl, og í móttøkuni st‡rdi hon øllum og tók mestsum alt. Eisini skulu bá›ir hevararnir takast fram. Torgunn Jónsdóttir heva›i 1. og 3. sett, og Herborg á M‡runi heva›i 2. sett. Tær bá›ar duga væl at sprei›a spæli› út til allar leikararnar, solei›is at torført er hjá mótstø›uli›unum at blokka. Álopsspæli› hjá Drátti er róst fyrr, og ta› er ikki so løgi›, tí bæ›i Helga Nordendal og Gerda Nattestad eru á landsli›num. Hetta li›i› hevur alt sum skal til fyri at vinna føroyameistaraskapin, men Mjølnir liggur framvegis og lúrir.

Vi›merking:

Andrea Kristoffersen í Fleyr stó› seg sera væl í hesum dystinum, men ta› rakk tó ikki til sigurs. ”Vit gera alt ov nógv mistøk og missa taki› til seinast í øllum settunum. Ta› er ikki nóg gott. Vit hildu okkum hava møguleikar í hesum dystinum, og serliga í 3. setti hildu vi›, at nú var vend komin í. Dráttur er sterkt li›. Ta› gongur væl hjá teimum í løtuni, men í dag góvu vit teimum alt ov nógv. Eg fari ikki at avskriva okkum heilt enn, men ta› ver›ur torført at vinna á Drátti og Mjølni”.

Fossánes–TB 0–3 (5-25, 11-25, 14-25)

TB smurdi Fossánes av

Fossanes eigur enn fyrsta setti› í meistaradeildini til gó›ar. Um vikuskifti› taptu tær greitt fyri TB

FLOGBÓLTUR
KVINNUR

TB-li›i› leikti upp til sítt besta, tá tær leygardagin vitja›u Fossánes, sum onganti› kom rættuliga fyri seg eftir ta skelkandi byrjanina, sum li›i› fekk í fyrsta setti.

TB, sum hetta setti› leikti væl og hev›i sera gó›ar servur, vann heili 25-5, og er hetta ov nógvur munur, tá ein veit, at Fossánes kann klára seg betur. Men einki virka›i í móttøkunum hjá Fossánesi, og sum tí›in lei›, virka›i ta› sum um hugurin til at betra um úrsliti› datt burtur.

2. og 3. sett

Í ø›rum og tri›ja setti var eitt sindur meira av dysti ímillum li›ini, men ta› sær út til, at TB eftir gó›a úrsliti› seinasta vikuskifti ímóti Drátti, har tær bert taptu 3-2 ímóti oddali›num, er betur fyri og ætlar sær at ver›a vi› í kappingini um eina betri plasering, enn li›i› hevur nú.

TB vann tey bæ›i næstu settini 25-11 og 25-14. Á TB-li›num skal eingin vera tikin framum nakra a›ra, men besti leikari hjá Fossánesi henda dagin var Lena í Bu›, sum ver›ur ein betri og betri leikari fyri hvønn dyst.

Stø›an, Meistaradeild Menn

Stø›an Li›	Dystir leiktir	vunnir	taptir	vunnin	Sett tapt	munur	* Stig
Mjølnir	7	6	1	20	8	12	12
Fram	7	4	3	16	12	4	8
Fleyr	7	4	3	14	12	2	8
ÍF	7	4	3	15	11	4	8
SÍ	8	0	8	2	24	-22	0

Stø›an, Meistaradeild Kvinnur

Stø›an Li›	Dystir leiktir	vunnir	taptir	vunnin	Sett tapt	* munur	Stig
Dráttur	9	8	1	26	7	13	16
Mjølnir	9	8	1	25	6	19	16
Fleyr	9	6	3	19	14	5	12
TB	9	3	6	17	19	-2	6
ÍF	9	3	6	12	20	-8	6
Fossánes	9	0	9	0	27	-27	0

gult cyan magenta svart